

– Vit eru farin í holt við fyrireikingarnar til at yvirtaka løgregluna, og har er nógv at tríva í, og eru hølisviðurskiftini eitt av tingunum vit mugu taka upp, sigur Høgni Hoydal

Savnsmynd

Høgni Hoydal:

# Tann akutti tørvurin fyrst nøktast

**Tjóðveldisflokkurin er ein av flokkunum, ið hevur arbeitt hart fyri at fáa rættarskipan og løgregluna yvir á føroyskar hendur. Men um vit onki fongsul hava, eru vit so klár til at yvirtaka løgregluna?**

FONGSUL
*Ingrid Bjarnastein*

– Eg eri ikki nóg væl inni í málinum fyri at kunna úttala meg konkret um tað, sigur Høgni Hoydal í Tjóðveldisflokkinum.

– Vit eru farin í holt við fyrireikingarnar til at yvirtaka løgregluna, og har er nógv at tríva í, og eru hølisviðurskiftini eitt av tingunum vit mugu taka upp.

Høgni Hoydal sigur, at tað, sum fyrst skal gerast er ein ætlan, har viðgjørt verður, hvussu umstøðurnar fyri fangar kunnu gerast betri. Men eitt fongsul kann hann ikki lova.

– Eitt fongsul er sjálvandi tað vit stíla fram ímóti uppá longri sikt, men fyrst og fremst má tann akutti tørvurin nøktast, sigur Høgni Hoydal.

Tá spurt verður um fangarnir skulu áhaldandi verða sendir niður til Danmarkar, svarar Høgni, at Hvíta bók leggur upp til samstarv við onnur lond, og hevur hetta eisini stóran týdning.

– Men tá fangar verða sendir til eitt annað land, avmarkar tú teir á ein hátt, at teir hava ikki eins góðan møguleika fyri eitt nú vitjanum, sum um teir stótu heima.

Tá løgreglan verður yvirtikin verður farið at arbeiða meira við teimum konkretu facilitetunum, og tá verður tikið upp, hvussu skal gerast við hølisviðurskiftini.

Um grundarlag er fyri einum fongsli í Føroyum sigur Høgni Hoydal, at tað veldst alt um, hvussu stórur tørvurin er, men sum sagt, so skal tann akutti tørvurin fyrst nøktast.



*Høgni Hoydal kann ikki veita trygd fyri, at eitt fongsul verður bygt í Føroyum. Fyrst skal tann akutti tørvurin nøktast*

*Mynd: Finnur Justinussen*


# Hjá okkum situr tú væl




Rúmligt, fjálgt og hugnaligt. Betri pláss til beinini og setur úr leðri í øllum flogfarinum. Atlantic Airways hevur enn einaferð gjørt tað høgligari at flúgva.

Vit hava innrættað kabinuna av nýggjum og tikið eina stólarekkju úr, so tað er vorðið munandi meiri rúmsátt hjá okkara ferðafólki. Vit hava eisini skift allar teir gomlu stólarnar út við fjálg leðursetur, so øll flúgva á fyrsta klassa hjá okkum.

Inni hjá okkum situr tú væl, meðan skipari og manning syrgja fyri, at tú fært ein góðan túr.

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo





# Lýsið har lýsingarnar síggjast

## Leys størv í Føroyum & uttanlands

Fyritøkur og stovnar kunnu nú keypa pláss til starvslýsingar sínar á føroyska portalinum - www.portal.fo og í blaðnum Sosialinum

Føroyski Portalurin, ið er nýggja navnið fyri Olivant.fo hýsir starvslýsingum hjá fyritøkum og stovnum, sum hava áhuga í, at starvslýsingar teirra skulu røkka enn fleiri lesarum. Vanliga vitja upp í 10.000 brúkarar www.portal.fo hvønn dag.




Lýsingarprísur pr. starvslýsing, galdandi frá at lýsingin er løgd út á føroyska Portalin:

| | |
|---|---|
| 1 viku | kr. 1.000,- |
| 2 vikur | kr. 1.500,- |
| til freistin er úti | kr. 2.000,- |




Tekstur (word-fílur) og møguliga búmerki skal sendast viðheft til teldupostadressuna: lysing@sosialurin.fo

Eru spurningar og/ella ivamál, eru tit altíð vælkomin at senda teldupost til:

lysing@sosialurin.fo
ella ring til
Finnbjørg ella Anju
Sosialurin 311820